TÓRSHAVNAR KOMMUNA
Postboks 32 • FO-110 Tórshavn
torshavn@torshavn.fo

Váttan fyri móttøku við dagfesting og stempul:

Umsókn um fríplass til musikkskúlaundirvísing

Fríplass kann játtast børnum og ungum undir 18 ár, har netto-inntøkan í húskinum er lægri enn eitt ávíst mark. Neyðugt er at hava fingið tilboð um musikkskúlaundirvísing, áðrenn tú kanst søkja um fríplass. Søkjast skal á hvørjum ári.

1. Áskrift frá umsøkjara

Navn á umsøkjara:	Telefon/fartelefon:
Bústaður:	Teldupostur:
Postnr. og býur/bygd:	Hjúnarstøða: ☐ Stakur ☐ Giftur ☐ Sambúgvandi
Føðingardagur:	Tal av børnum undir 18 ár í húskinum:

Tá støða skal takast til, um ein umsøkjari er einsamallur ella ikki, er bústaðurin í fólkayvirlitinum ikki galdandi, men um umsøkjarin livir saman við øðrum, sambúgvandi ella giftur, og er hetta eisini galdandi, hóast viðkomandi ikki er foreldur at barninum.

2. Søkt verður um fríplass vegna

Navn á næmingi:	Føðingardagur og P-tal:

Ljóðføri/undirvísingartilboð (t.d. violin / trompet / kór / musikkspælistova):

3. Áskrift frá hjúnafelaga / sambúgva

Navn:	Føðingardagur:

4. Inntøkuviðurskifti

Eru inntøkuviðurskiftini í ár broytt í mun til seinasta ár? ☐ Ja ☐ Nei

Soleiðis fært tú fatur á yvirlitunum:

- *Rita inn á borgaragluggan hjá TAKS á heimasíðuni hjá TAKS (taks.fo)*
- *Vel spjaldrið »Løn«*
- *Vel røttu tíðarskeiðini fyri í fjør og í ár, trýst á grøna pílin fyri hvørja postering, soleiðis at tað sæst, hvussu nógv er utgoldið, og trýst á »skriva út« ovast í høgra bredda*



- *Goym útskriftirnar sum PDF og viðfest tær í tínari umsókn um fríplass til musikkskúlaundirvísing*

Aðrar inntøkur og/ella onnur viðurskifti:

Hava tú ella sambúgvi eyka inntøkur afturat lønarinntøkunum, skalt tú viðfesta skjalprógv fyri eykainntøkurnar. Eykainntøkur kunnu til dømis vera inntøkur frá útleigan av íbúð, inntøkur frá virðisbrøvum ella inntøkur, ið ikki eru skattskyldugar í Føroyum. Tú hevur skyldu til at kunna okkum um tílíkar inntøkur.

5. Váttan frá umsøkjara

Undirritaði váttar við hesum, at upplýsingarnar undir pkt. 1 til 4 eru sannar. Eg loyvi kommununi at útvega allar neyðugar upplýsingar um viðurskifti, herundir frá skatta-valdinum.	Dagfesting:	Undirskrift: